## Fara til Dímunar við báti



Sunnudag 15. juni verður útferð gjørd til Stóru Dímunar við útróðrarbátinum »Hvíthamri« av Sandi um viðrar

Stóra Dímun: Ætlanin er at fara úr Sands Havn kl. 10.30, har siglt verður við hesum útróðrarbátinum út í oynna.

Umborð er tað bátasmiðurin, Jóan Petur Clementsen, ið er skipari. Tá komið er til Dímunar, verður gingið upp gjøgnum Kleivina, saman við Dímunarbóndanum. Hann verður eisini ferðaleiðari á oynni, her hann vísir fólki runt og greiðir frá.

Sagt verður, at túrurin verður einans sigldur, um veðrið er til vildar. Neyðugt er at melda til á Sandoyar Kunningarstovu. Pláss er fyri 12 fólkum.

Ætlanin er at gera nakrar túrar út í Dímunar nú í summar um veður og vindur loyva tí. Ber ikki til hjá fólki at fara á túrin 15. juni, verður hesin møguleiki aftur 29. juni, 13. juli, 20. juli og 10. august. Teistin siglir av Gomlurætt kl. 9.45 og í Skopun er busssamband til havnina á Sandi.

**sb.**

# Aktivur og vistfrøðiligur túrur í fjøllunum



*Føroyska náttúran er vøkur. Tað ynskir Faroe Adventure at vísa føroyingum og útlendingum á*

**Mánadagin verður ein serstakur møguleiki at ganga fjøllini norðarlaga á Streymoynni. Tá skipar fyritøkan Faroe Adventure fyri eini slíkari ferð fyri føroyingum og útlendingum**

FERÐAVINNA
*Snorri Brend*

**Norðurstreymoy:** - Vit ætla at læra fólk at kenna ta føroysku náttúruna og síggja, hvussu vøkur hon er. Og so ynskja vit eisini at vísa á, hvussu neyðugt tað er at hon ikki verður oyðiløgd, sigur Eyðun Berg frá Faroe Adventure.

Í eina tíð hevur verið arbeitt við at fyrireika eitt tilboð til øll tey, sum hava áhuga fyri at ganga í fjøllunum.

Nú fáa hesi ein spennandi møguleika at vitja fjøllini norðarlaga á Streymoynni og sleppa haraftrat at uppliva, hvussu tað er at sova í tjaldi úti í føroysku náttúruni.

Fyri 1500 krónur kunnu fólk nú fáa hesa upplivingina, har stórur dentur verður lagdur á trygdina. Við í kostnaðinum er eisini matur, ferðaleiðari, tjalding og annað.

- Upplivingarnar á ferðini eru kortini ókeypis!, sigur Eyðun Berg við einum brosi.

Fyrsta ferðin verður gjørd nú mánadagin. Neyðugt er at tekna seg hjá Eyðuni á fartlf. 287373, tí ferðin verður bert gjørd um minst fýra luttakarar boða frá luttøku.

Í fyrstu syftu er ætlanin at gera túrar í Streymoynni, men sum skilst eru eisini fleiri áhugaverdir møguleikar í Suðuroynni.

### Varðveita náttúruna

Tað eru helst tey, ið sita heima og droyma um ein gongutúr í fjøllunum við ferðaleiðara, yvirnátting, góðum mati og góðari uppliving.

Henda tørvin ætlar nú Faroe Adventure at hjálpa fólki við, sum ein part av arbeiði teirra at skipa eina fyritøku á vistfrøðiligum støði.

Lagt verður til brots frá Leynavatni á middegi fyrra dagin, og síðani verður gingið niðan á fjøllini, har møguleiki er at fara á toppin á Sneis. Haðani verður leiðin løgd ímóti Vestmanna og at enda verður kósin sett ímóti Saksun, har komið verður um náttúrðatíð kvøldið eftir.

Á ferðini verður sovið í tjaldi, eins og alt verður gjørt fyri at luttakararnir ikki á nakran hátt skulu ganga svangir. Borðreitt verður við góðum og orkugevandi mati, soleiðis at fólk megna henda túrin, sum annars krevur eitt sindur av tí einstaka.

Í fyrireikingunum til henda serstaka gongutúrin hava fyrireikararnir lagt dent á, at tey luttakandi uppliva vakurleikan og friðin, sum valdar í føroysku náttúruni.

Eitt annað endamál er at vísa fólki á týdningin av at fara væl um náttúruna. Á túrinum verður tí skipað fyri, at hvør einstakur luttakari skal taka okkurt ruskið, sum sløðist í náttúruni við sær heimaftur til ruskspannina.

- Alt ger mun. Á henda hátt kunnu vit so líðandi minka um dálkingina av náttúruni, sigur Eyðun Berg.



*Alt er gjørt so at luttakararnir skulu fáa eina veruliga uppliving í náttúruni. - Neyðugt er við góðum og orkugevandi mati á slíkari ferð, sigur Eyðun Berg sum her stendur fyri matgerðini*

# Sleppa at síga á fyrsta sinni

**Tey, ið hava hug at uppliva nakað ekstremt í morgin, fáa høvið til hetta í morgin. Tá verður nevniliga møguleiki at síga í berginum vestantil á Sandoynni**

FERÐAVINNA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Sandoy:** - Vit fáa ofta fyrispurningar um møguleikar fyri ekstremum ítrótti í Føroyum. Tað hevur higartil verið trupult at eftirkoma hesum ynskinum.

- Men nú hava vit so gjørt okkara til at bjóða føroyingum og útlendingum ein einastandandi møguleika at kunna síga í bjørgunum her í Lonini, sigur Fríðtór Debes, leiðari á kunningarstovuni í Sandoy.



*- Nú kunnu tey ekstremu sleppa at royna seg í bjørgunum á Sandoynni, sigur Fríðtór Debes, leiðari á Sandoyar Kunningarstovu*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Hetta tiltakið varð roynt fyri innbodnum fyrr í mánaðinum, og fekk hetta sera góð ummæli frá teimum sum royndu hetta. Nú er ætlanin at almenningurin skal sleppa at royna hetta ekstrema, at kunna síga 300 metrar niður á einum staði tey nevna í Lonini.

Sagt verður frá góðum líkindum leygardagin, og tá verður á fyrsta sinni roynt at síga í bjørgunum saman við áhugaðum fólki.

### Ganga og síga

Leygardagurin er serstakur dagur, við tað at tað verður ókeypis at sigla við Strandferðsluni. Tí verður vónað, at mong fara at leggja leiðina til Sandoynna í hesum sambandi.

Fyrireikararnir hava fyrireikað seg væl, og lagt alt til rættis, soleiðis at øll skulu fáa ein góðan túr burtur úr tí.

Ferðina byrjar á Gomlurætt fyri tey, ið koma norðanfjørðs. Tá fer báturin av Gomlurætt kl. 8:45, og í Skopun stendur bussur fyri fólki og koyrir tey tað vakra strekkið til Søltuvíkar og aftur eftir loknan túr.

Úr Søltuvík verður farið til gongu við kønum fólki, sum á teirri umleið 75 minuttir longu gonguferðini greiðir frá ymiskum viðurskiftum í oynni.

Tá komið verður til staðið, har sígast skal, verður ein góður biti við føroyskum viðskera at fáa hjá fólki, aftur við einum góðum drekkamunni.

Síðani er løtan komin til teirra, ið hava hug at síga niður í Lonina. Hetta verður leitt av kønum monnum, ið hava roynt hetta mangar ferðir áður.

- Tað eru kanska ikki øll, ið hætta sær at síga í Lonini. Hesi kunnu kortini fáa ein frálíkan túr, tí náttúran sjálv er bæði stórsligin og vøkur, sigur Fríðtór Debes.

Eftir at liðugt er at síga verður farið til gongu, og tekur hesin túrurin slakar 45 minuttir. Gingið verður til bussin, sum koyrir fólkið aftur til Skopunar.